Ivasamt um Vágatunnilin letur upp í ár

Vantandi brunatrygd kann gera, at Vágatunnilin ikki verður latin upp tann 26. november sum ætlað. Kanska als ikki í hesum árinum

BRUNATRYGD
Edvard Joensen

Tá undirsjóvartunnilin varð skotin ígjøgnum, var hátíðarhald. Ætlandi skal enn meira gerast burtuúr, tá tunnilin veðru tikin alment í brúk. Men ivi verður nú sáddur um, um hann verður latin upp tann 26. november, sum ætlað, ella um hann yvirhøvur letur upp í ár

Trygdarviðurskiftini viðvíkjandi undirsjóvartunnilin um undir Vestmannasundi eru ikki í lagi. Avleiðingin kann gerast, at tunnilin als ikki letur upp í ár.

Málið snýr seg um, at útgerðin til eldsløkking og tað, sum har til hoyrir, er ikki nøktandi. Strong krøv eru sett til slíka útgerð og til trygdina yvirhøvur. Eingin ivast í, at hetta bara skal vera í lagi, og allir partar eru samdir um, at útgerðin skal fáast til vega.

Men so røkkur semjan ikki longur, tí tá talan verður um, hvør skal gjalda fyri trygdina, er tað, at partarnir fara hvør sín veg.

Sum Sosialurin skilir á keldum, sum kenna til málið, hevur leiðslan í partafelagnum Vágatunlinum hug at halda, at Sandavágs Kommuna skal fáa til vega ta útgerð, sum krevst til roykkaving, eldsløkking og ikki minst at flyta hesa útgerð úr goymslu á staðið, um brúk verður fyri henni inni í tunlinum.

Men Sandavágs Kommuna vil ikki gjalda fyri útgerð, sum kommunan metir, at Vágatunnilin eigur at fáa til vega, siga keldurnar.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, vil onga viðmerking gera yvirhøvur til málið. Tað er ikki komið nóg langt enn, sigur hon.

Tó sigur hon, at hon væntar, at málið verður loyst. Í øllum førum verður skipað fyri skeiði fyri brandmonnunum í komandi viku, sigur hon.

Sosialurin veit, at arbeitt verður við at fáa upplýsingar um útgerð. Eitt nú úr Íslandi verður roynt at fáa slíkar upplýsingar. Bæði um útgerðina sum so, um prís og ikki minst um veitingartíð.

Men eitt, sum gongur aftur og aftur í teimum upplýsingum, blaðið hevur fingið um málið, er, at veitingartíðin er so mikið long, at tað verður í hvussu er ikki fyri nýggjár, at nøkur útgerð kann vera í Føroyum. Kanska ikki fyrr enn móti sumri, verður sagt.

Sum heild eru partarnir, sum hava við málið at gera, sera tigandi, tá gingið verður á teir.

Keldur okkara vita at siga, at tað er Brunaumsjón Landsins, sum hevur víst á, at trygdin ikki er í lagi, og eisini kravt, at tað skal hon vera, áðrenn latið verður upp.

Leiðarin á Brunaumsjónini var staddur uttanlands, tá vit fingu orð á hann. Men hann var sera fámæltur og vildi ikki gera nakrar viðmerkingar til hetta málið, tí tað er ikki avgreitt, sigur hann.

Heldur ikki frá leiðsluni í partafelagnum Vágatunlinum bar til at fáa nakra viðmerking, áðrenn blaðið fór til prentingar. Nevndarformaðurin, Klæmint Weihe, er staddur uttanlands, og var ikki við fartelefonina, tá vit ringdu til hansara í gjár, og Dávur Reinert Hansen, stjóri, var upptikin á fundi og fekst ikki at gera viðmerkingar til málið.

Tingmenninir vita av ongum

Vágatingmenninir eru ovfarnir av at frætta, at útlit eru fyri, at tunnilin verður seinkaður. Teir siga báðir við ein munn, at tað skal ikki henda

TUNNILSTRYGD
Edvard Joensen

Vágatingmenninir eru púra samdir um, at tað skal ikki koma fyri, at tunnilin verður seinkaður.

Majus Dam, løgtingsmaður, sigur, at fæst útgerðin ikki til keyps, má hon leigast.

Starvsfelagi hansara, Jóanes Nielsen, sigur, at tað kann ikki góðtakast, at tunnilin verður seinkaður, og hann fer at kanna málið beinanveg og royna at finna út av, um ikki eitthvørt kann gerast.

Vágatingmenninir siga báðir, at hetta er heilt nýtt fyri teimum, hóast Jóannes Nielsen kortini viðgongur, at hann hevur óttast, at tað kundi henda.

Eg ætli mær at flagga fyri tunlinum tann 26. november. Tað ber ikki til at útseta hetta nú, tí fólk hava fyrireikað seg upp á hendan dagin, og nógv hava fingið sær frí til júst hetta høvið, sigur Marjus Dam

Hann sigur seg hava spurt um hetta málið á fundi í vikuni, og fekk tá at vita frá leiðsluni í partafelagnum Vágatunlinum, at arbeiðið gekk eftir ætlan, og tunnilin verður klárur til tann 26. november.

Men hann ásannar, at tá varð tosað um sjálvan tunnilin og ikki brunatrygdina.

Marjus Dam sigur, at tað kann ikki góðtakast, at ein spurningur um, hvør skal gjalda einar tvær milliónir í eini verkætlan upp á hálvtriðjahundrað milliónir krónur, skal seinka tunlinum.

Tað fer at kosta nógv meira, enn tað hendan útgerðin kostar, um ikki verður latið upp fyri jól, heldur hann.

– Øll tann ferðslan, sum fer at verða um flogvøllin um jólini, fer eisini at geva tunlinum inntøku, sigur hann, og roknar sostatt við, at tað kortini ikki verður ókeypis at koyra gjøgnum tunnilin. So mikið væntar Marjus Dam, at jólaferðslan gjøgnum tunnilin fer at geva, at tað ríkiliga gevur partafelagnum Vágatunlinum aftur tað, sum sløkkiliðsútgerðin kostar. Tí er eingin ivi í hansara sál um, at Vágatunnilin skal gjalda útgerðina og fáa hana til vega beinanveg, sigur Marjus Dam, tingmaður Sambandsfloksins í Vágum.

Ginu søgur:

Lyfta skjúrtið upp fyri tabuevnum

Um stutta tíð fer Leikhúsið Gríma at framføra heimskendu Ginu Søgurnar eftir Eve Ensler

SJÓNLEIKUR
Ingrid Bjarnastein

Ginusøgur eru provokerandi og skakandi, men leikararnir gleða seg til at hoyra, hvat føroyingar siga til ein slíkan leik. Gunnvá Zachariasen er ein av leikarunum og Ria Tórgarð hevur leikstjórnað

Mynd: Jens Kr. Vang

Ginu søgur, ella Vagina Monologues, sum tær eita á enskum, eru søgur fortaldar av kvinnum um seksualitet. Tær eru skakandi og provokerandi. Tær fara inn á øki, sum annars vanliga verða sædd sum tabu. Men hetta eru søgur, sum systir tín, mamma tín, mostir tín, vinkona tín ella tú sjálv kann hava verið úti fyri. Gerandissøgur um tráðan, longsul, leitan eftir samleika…

Eve Ensler

Amerikanarin, Eve Ensler, hevur skrivað Ginu søgurnar. Hon sigur sjálv, at hon minnist ikki, hvussu leikurin varð til, men hon hevði tosað við eina gamla konu. Tað, sum skelkaði hana var, at henda gamla konan tosaði ógvuliga niðurgerandi um síni egnu kynsgøgn. Eve Ensler fór síðani at tosa við aðrar kvinnur um teirra seksualitet, og at enda hevði hon tosað við yvir 200 kvinnur frá ymsum londum, sum høvdu ymsar mentanir, í øllum aldursbólkum og stættum.

Í fyrstuni framførdi Eve søgurnar sjálv. Uttan at hon visti tað. Fólk streymaði til frá øllum ættum at hoyra søgurnar. Fyrstu ferð Ginu søgur vórðu framførdar var í 1996, og hava verið spældar uttan íhald líka síðani.

Nú er Gríma farin undir Vagina Monologues. Ein einfaldur leikur við trimum leikarum.

– Palluppsetingin er sera einføld. Bara tríggir stólar og so leikararnir. Hetta eisini fyri, at leikurin skal kunna spælast allastaðni, greiðir Ria Tórgarð frá, sum hevur leikstjórnað.

Ria hevur eisini umsett leikin úr enskum.

– Tað var ógvuliga ringt at umseta. Fyri tað fyrsta, so fann eg ikki øll orðini eg skuldi brúka í orðabókini, og noyddist tí út at spyrja fólk. Og harafturat skuldi eg sjálv útum eitt mark, har eg mátti siga við meg sjálva, at tað eg gjørdi var í lagi. Umfram hetta skuldi eg eisini megna at varveita tað poetiska í søgunum og finna eina føroyska mynd upp á tær, greiðir Ria Tórgarð frá.

Stuttligt

Útgangsstøðið í søgunum er kvinnan og hennara seksualitetur. Men hetta vil ikki siga, at leikurin bert er fyri kvinnur. Hann er fyri øll. Leikararnir vilja heldur ikki seta nakað aldursmark á.

– Leikurin er ikki bara um harðskap og neyðtøkur. Humor er ógvuliga týdningarmikil í leikinum. Har eru nógvar stuttligar søgur, sum nógvar kvinnur kunnu játta nikkandi til.

Tað hevur heldur ikki verið bara sum at siga tað at venja leikin hjá teimum trimum Biritu Mohr, Gunnvá Zachariasen og Kristinu Hansen.

– Nógv suff hava verið, og vit hava eisini noyðst at tikið eitt sindur í egnan barm, tí kvinnur eru so innilæstar. Og at noyðast at tosa um kynsgøgn er ikki altíð so lætt, sigur Gunnvá Zachariasen.

Men leikstjóri og leikarar gleða seg nógv. Bæði til at framføra leikin og fyri at hoyra, hvat fólk fara at siga um leikin.

Nógvar kendar kvinnur hava verið við at framføra Ginu søgur. Nevnast kunnu millum annað Glenn Close, Claire Danes, Calista Flockhart og nógvar aðrar. Listin er óendaligur.

Gríma 25 ár

Hesin leikurin er fyrsta útspæl frá Grímu nú leikhúsið fer undir sítt 25. spæliár. Ætlanin er at fara út at ferðast við hesum leikinum. Hann verður frumførdur 5. oktober. Hvussu leingi hann verður á skránni er ilt at meta um – alt eftir, hvussu hann verður móttikin.

Í november sleppa mannfólkini framat. Tá fara teir at framføra ein leik, ið kallast »List« eftir Yasminu Reza úr Fraklandi. Tann leikin hava Jette og Gunnar Hoydal týtt, meðan Eyðun Johannesen leikstjórnar. Menninir, ið spæla við eru Hans Tórgarð, Kári Øster og Bárður Persson.

Hesin leikurin snýr seg mest um vinarlagið millum trý ólík mannfólk. Ein dagin keypir ein teirra ein hvítan málning fyri 200.000 frankar. Keypið elvir til mikið kjak teirra millum og 15 ára vinarlagið sleppur av sonnum at standa sína roynd.

Seinni í vetur er ætlanin at fara undir ein barnaleik og um hálvan mars verður ein klassikari helst á skránni. Her verða bæði konufólk og mannfólk til.

– Vit ætla at royna at fara út um Havnina við leikunum, tí hetta var tað Gríma av fyri langari tíð legði út við, sigur Eyðun Johannesen , leikstjóri.

Men í fyrsta umfari kunnu vit gleða okkum til leikirnar Ginu søgur og List, sum verða frumframførdir ávíkavist í oktober og november.